Toll- og Skattstova Føroya

# Málsviðgeri

Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálaráðnum.

Uppgávur stovnsins eru m.a. at fyrisita
- skattalógina
- tolllógina
- mvg-lógina
- kolvetnisskattalógina
- avgjaldslógirnar,

eins og alla skuldarinnkrevjing hjá landinum.

Stovnurin hevur 150 starvsfólk og er skipaður soleiðis, at planlegging og menning fer fram í Stýrinum á Argjum. Tær seks økisskrivstovurnar, ið eru á Tvøroyri, í Skopun, Sørvági, Tórshavn, Saltangará og Klaksvík røkja rakstururin.

Á Eysturoyar Øki, har viðkomandi kemur at starvast, eru 20 starvsfólk.

Á Toll- og Skattstovu Føroya, Eysturoyar Øki, er starv leyst at søkja til setan skjótast til ber.

**Høvuðsuppgávur**
Pantifúti, herundir málsviðgerð og innheinting av krøvum til landskassan.

**Førleikakrøv**
Tann, sum settur verður, skal helst hava roknskaparligan førleika. Viðkomandi skal vera fyrikomandi og arbeiðssamur og kunna arbeiða sjálvstøðugt. Kunnleiki til EDV á brúkarastøði er ein treyt.

**Vit kunnu bjóða**
- eitt spennandi starv við nógvum avbjóðingum, sum samstundis eisini er fakliga krevjandi
- klokkuskipan við flextíð
- sjálvstøðugt starv í góðum arbeiðsumhvørvi.

**Setanartreytir**
Løn- og setanarviðurskiftir, sum eru treytað av starvsroyndum og útbúgving, eru eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Núverandi setanarøkið er Eysturoyar Øki, men fevnir annars um Fíggjarmálaráðið og stovnar undir tí, og tann, ið settur verður, skal kunna røkja tænastu á hesum støðum, um tað verður kravt.

Viðkomandi, ið settur verður, skal vera fúsur at luttaka í teimum útbúgvingarmøguleikum, sum Toll- og skattstovan bjóðar bæði á stovninum og uttan fyri stovnin eitt nú á handilsskúla v.m. og taka lut í teimum skeiðum, sum stovnurin fyriskipar.

**Nærri frágreiðing um starvið** fæst við at venda sær til Ingolf Lamhauge, Økisstjóra, á tlf. 44 85 88.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvum, viðmælum og upplýsingum um viðkomandi starvsroyndir skulu vera Toll- og Skattstovu Føroya, Eysturoyar Øki, í hendi í seinasta lagi:

**18. juli 2002**

**Toll- og Skattstova Føroya**
Eysturoyar Øki
Postsmoga 225
FO-600 Saltangará

*Lýsingin finst eisini á heimasíðu okkara www.tollskatt.fo*

*E-mail: eysturoy@tollskatt.fo*

# Summarfrí

**22. juli - 9. august**

Vegna summarfrí er avgreiðslan stongd frá mánadegnum 22. juli til fríggjadagin 9. august, báðir dagar íroknaðir.

Telefonavgreiðslan er tó opin mánadag til fríggjadag kl. 10.00 - 12.00. Eisini er møguligt at seta seg í samband við ALS um telefax ella teldupost. Útgjaldið av arbeiðsloysisstuðli fyri skeið 14 og 15 verður avgreitt sum vanligt.

ALS

Arbeiðsloysisskipanin • Postsmoga 3022 • FO-110 Tórshavn
Tel 349550 • Fax 349551 • als@als.fo • www.als.fo

# Skipasmiðjan á Skála P/F

**søkir eftir tekniskum leiðara**

**Starvið:**
Sum tekniskur leiðari fær tú ábyrgdina av øllum tekniskum spurningum á Skipasmiðjuni. Tekniski leiðarin verður partur av leiðslu felagsins við beinleiðis tilvísing til stjóran. Tekniski leiðarin skal vera við til at menna virkið tekniskt, somuleiðis sum hann skal viðvirka til at styrkja verandi virksemi og finna nýggjar møguleikar fyri øktum virksemi.

Arbeiðsplássið er á Skála.

**Høvuðsuppgávur:**
- at vera driftsleiðari og samskipa tær ymisku uppgávurnar.
- at vera tekniskt tengilið millum virkið, viðskiftafólk og myndugleikar.
- at vera við til at leggja ætlanir fyri arbeiði og menning av virkinum.
- at vera við til at mynda leiðsluna á virkinum bæði dagliga og við framtíðini í huga.
- at vera formonnum og starvsfólki annars til hjálpar í tekniskum spurningum.
- at leiða tilboðsrokning og gera metingar av arbeiðum sum heild, bæði fíggjarliga og hvat viðvíkur tíð.

**Førleikar:**
Vit rokna við at tú:
- er maskinverkfrøðingur og/ella hevur víðkað maskinmeistaraprógv.
- hevur góð samskiftis- og samstarvsevnir.
- hevur evnir at greina tekniskar trupulleikar, viðgera møguleikar til loysnir og ert førur fyri at taka avgerðir.
- dugir væl at málbera teg á føroyskum, skandinaviskum og enskum máli, bæði skrivliga og munnliga.

**Vit bjóða:**
Eitt sjálvstøðugt arbeiði við góðum møguleikum fyri persónligari menning.
Løn, trygging og eftirløn eftir nærri avtalu partanna millum.

Um hetta hevur tín áhuga ella um tú hevur spurningar hesum viðvíkjandi, vinarliga set teg í samband við okkum á tlf. 44 11 55.

Skrivlig umsókn við upplýsingum um royndir og útbúgving skal sendast til:

Skipasmiðjuna á Skála
att.: Marni Olsen
FO-480 Skála

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði og freistin at lata inn er 31. juli 2002.

**www.faroeyard.fo**

SKIPASMIÐJAN Á SKÁLA

**skala@faroeyard.fo**

P/f Skipasmiðjan á Skála er dóttirfelag hjá P/f Tórshavnar Skipasmiðju og har starvast umleið 75 fólk .

**Visti tú ikki tað? Sosialurin**

**Lesið Sosialin**

Fa / Bormann
Boring . Spreinging . grevstur .
Tlf. 225421



## Útibarnagarðurin Víkin í Æðuvík

# Pedagogur/ Hjálparfólk

Vegna barnsburðarfarloyvi verður søkt eftir 1 pedagogi 35 tímar um vikuna, til útibarnagarðin Víkina. Starvið er tíðaravmarkað frá 9. september og so leingi barnsburðarfarloyvi varar.

Á stovninum eru 24 børn í aldrinum 5–7 ár.

Vit ynskja at tú:
- dámar væl at vera úti í náttúruni
- ert kreativ/ur
- hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan dag saman við børnunum
- ert við til at menna tað pedagogiska arbeiði
- hevur gott foreldra- og starvsfólkasamstarv
- dugir at seta teg inn í støðuna hjá tí einstaka barninum

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Káru Løkin tlf. 214306 ella 448686.
Løn samb. sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Um eingin pedagogur søkir, verður hjálparfólk sett í starvið.

Skrivlig umsókn, saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum, skal vera kommununi í hendi áðrenn 30/07-2002.

**Runavíkar Kommuna**
Postboks 139
600 Saltangará

# Dagrøktarar søkjast

Søkt verður eftir dagrøktarum til dagrøktarskipanina í Skála Kommunu, at byrja 15. august.

Viðkomandi skal hava áhuga og hegni at arbeiða við børnum.

Dagrøktarheimið skal vera soleiðis innrættað, at tað er gott og trygt at spæla innan- og uttandura.

Umsóknir skulu vera dagrøktarleiðaranum í hendi í seinasta lagi 1/8-2002.

Áhugað kunnu venda sær til
**Liljan Chung**
dagrøktarleiðara
á tlf. 227393 ella 441863

# Summarfrí

Vegna summarfrí verður kommunuskrivstovan stongd 22. juli – 9. august 2002.

**Leirvíkar Kommuna**
Postrúm 42
520 Leirvík

# Pedagogur ella hjálparfólk

**til Bústovnin á Mýrivegi, Klaksvík**

Innan Trivnaðarmálaráðið og stovnar undir tí, við tænastu inntil víðari á Bústovninum á Mýrivegi 13A er eitt pedagogstarv leyst til setan 1. august 2002 ella eftir nærri avtalu.

Starvið verður sett antin sum tænastumannastarv ella sum sáttmálasett, eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og F. Pedagogfelag, lønt lønarstigini 24, 25, 27, 28, 30 og 31 eftir lønartalvuni frá mars 2002 ella fyri sáttmálasett lønt stigini 11-16. Arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna, skiftandi vaktir og annaðhvørt vikuskifti.

Á bústovninum búgva 4 børn/ung við sjúkragreiningini autismu. Endamálið við okkara arbeiði er at skapa tryggar karmar hjá íbúgvunum og at seta í gongd og skipa fyri virksemi, sum er til gagn fyri hvønn einstakan.

Umráðandi er at umsøkjarin er væl fyri kropsliga, er áhugaður í at verða nógv úti í náttúruni, svimja o.a. Somuleiðis hevur tað týdning at umsøkjarin hevur góð samstarvs- og innlivingarevni.

Av tí at Bústovnurin er nýggjur og tí undir uppbygging, kunnu vit bjóða eitt spennandi arbeiði, við nógvum avbjóðingum bæði persónliga og fakliga.

Bert fólk, sum hava lokið námsfrøðiligt prógv, kann setast í pedagogstarvið, men um ikki útbúgvið fólk verður sett, verður fólk við øðrum førleika sett í tíðaravmarkað starv.

Nærri fæst at vita um starvið frá leiðaranum á telefon 456310. Umsóknarfreistin er 27. juli 2002 og skulu umsóknirnar, saman við prógvum, viðmælum v.m. sendast til

**Bústovnin á Mýrivegi**
Mýrivegur 13 á
700 Klaksvík

# Frá S&K-felagnum

Vegna summarferiu er skrivstovan stongd frá týsdegnum 30. juli til mánadagin 19. august.

S&K **Nevndin**

**Til keyps og leigu:**
- Minigravimaskina á beltum - 800 kg
- Bob Cat lessumaskina, til fjølbroyttar uppgávur
- Transportari á beltum til sand, grús, asfalt o.a.
- Trumla til asfalt, grús, sand
- Luftkompressarar, luftamboð og boriútgerð
- Fasadustillads og aluminium stillads á hjólum
- Forskallingar og forskallingsútgerð
- Sjálvkoyrandi lift røkkur 19 metur
- Ymiskar maskinur og amboð

*Umframt mangt annað!*

**Kaj Andreasen & Co**
Heilsøla, smásøla & umboð - Tel. 315600 - Fax 318008

**Sosialurin** -tað loysir seg

LØGMANSSKRIVSTOVAN

# Hjálparfólk

Søkt verður eftir avloysara fyri hjálparfólk í barnsburðarfarloyvi frá 1. september 2002 og til 28. februar 2003.

**Uppgávur**
Starvið fevnir um móttøku, telefonavgreiðslu, kopiering, røkt av fundarhøli, innkeyp og aðrar innanhýsis tænastur.

**Faklig førleikakrøv**
Ynskiligt er, at umsøkjarar hava skrivstovuútbúgving ella aðra samsvarandi útbúgving.

**Persónlig førleikakrøv og royndir**
Umsøkjarar skulu hava góð samstarvsevni, kunna arbeiða sjálvstøðugt og kunna virka til lítar á ein tryggan hátt í einum umhvørvi har mál til tíðir hava nógvan skund.

**Løn og setanartreytir**
Starvið verður sett í lønarflokki 2 sambært sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

**Nærri upplýsingar um starvið**
Møguligir umsøkjarar eru vælkomnir at seta seg í samband við Petur Simonsen, umsitingarleiðara, tlf. 351010 ella 284249, fyri at hoyra meira um starvið.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum, c.v. og møguligum viðmælum skulu sendast

Løgmansskrivstovuni
Postsmogu 64
110 Tórshavn

Umsóknir skulu vera á Løgmansskrivstovuni í seinasta lagi mánadagin 5. august 2002. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Løgmansskrivstovan er fyrisiting hjá løgmanni. Løgmansskrivstovan er skipað í tvær deildir og tvær tænastueindir og hevur í høvuðsheitum tvørvegis og samskipandi uppgávur, eitt nú landstýrisfundir, uttanlandsmál, umboðan, starvsfólkapolitikk, fyrisiting, nýskipan og sjálvstýrismál.

# Landsverkfrøðingurin

Sagt verður frá, at asfaltverkið og skerverkini eru stongd í summarfrítíðini frá 22. juli til 19. august.

LANDSVERKFRØÐINGURIN

# Video-handil til sølu

DVD og VHS filmar at leiga út, við innbúgvi, verður selt fyri sámuligan prís – møguleiki er at leiga núverandi høli.

**Video 2000**
Tlf. 310767 – 213388